# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 26. januar 2021
Mál nr.: 21/00236-6
Málsviðgjørt: JEB
Eftirkannað: 11. desember 2020

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu**
(Øktar útreiðslur til verkætlanina)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 60 frá 30. apríl 2018 um at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu verður í § 1, stk. 2 “29 mió. kr.” broytt til: “39 mió. kr.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Broytingaruppskotið verður lagt fyri Løgtingið, nú búheimið, umlættingarheimið og virknistænastan til børn og ung við autismu er liðugt prosjekterað, arbeiðstøkurnar hava verið í útboði og kostnaðurin er kendur. Klárt er at fara undir at byggja, so skjótt fíggjarliga heimildin er samtykt.

Løgtingslóg nr. 60 frá 30. apríl 2018 heimilar at byggja eitt búheim og umlættingarheim til børn og ung við autismu fyri 29 mió. kr.

Í sambandi við byggifyrireikingina gjørdist greitt, at tað bar ikki til at byggja samsvarandi byggiskránni fyri 29 mió. kr. Ráðgevararnir fingu tí loyvi til at prosjektera fyri ein hægri kostnað, soleiðis at bygningurin nøktar tørvin, sum er lýstur í byggiskránni.

Verkætlanin varð av fyrstani tíð boðin út í januar 2020, og lisitatión var í februar 2020. Kostnaðarmetingin, tá verkætlanin varð boðin út, var á 41 mió. kr. Innkomnu tilboðini vóru munandi hægri enn kostnaðarmetingin, og lægsta tilboðið, saman við øðrum útreiðslum, var omanfyri 56 mió. kr. Landsstýriskvinnan tók tí avgerð um at havna lisitatiónini. Seinasta árið er farið við at finna sparingar og gera nýtt høvuðsprosjekt. Fleiri sparingar eru gjørdar, tó uttan at tað gongur út yvir funktiónirnar og virksemið í heiminum.

Umprosjekteraða høvuðsprosjektið varð boðin út alment í sjey arbeiðstøkum í desember 2020, og sambært lægstu tilboðunum, umframt aðrar kostnaðir, er neyðugt at hækka fíggjarligu heimildina í verklagslógini úr 29 mió. kr. uppi í 39 mió. kr.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Løgtingslóg nr. 60 frá 30. apríl 2018 heimilaði at farast skuldi undir at byggja eitt búheim og umlættingarheim til børn og ung við autismu fyri 29 mió. kr.

Byggingin fevnir um tríggjar eindir; eina búfólkaeind við seks búplássum, eina umlættingareind við seks umlættingarplássum og eitt dagtilboð til áleið 16 borgarar.

Í viðmerkingunum til lógina stendur undir nr. 2.1, at kostnaðarmetingin er gjørd út frá eini byggiskrá, og við ávísum fyrivarni, er kostnaðarmeting 29 mió. kr.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at hækka fíggjarliga karmin, soleiðis at heimið til børn og ung við autismu kann byggjast samsvarandi umprosjekteraða høvuðsprojektinum. Talan er um sama verklag, sum tá løgtingslógin varð samtykt í 2018.

Endamálið við lógini er liður í at bøta um umstøðurnar hjá fólki, ið bera brek í Suðurstreymoy. Verandi bústaðir og bústovnar eru í ringum standi, bíðilistin til búpláss er langur, og eingi tøk pláss eru í skipanini til bráðfeingis búpláss.

Eisini hevur pedagogiska eftirlitið staðfest, at fysisku karmarnir hava beinleiðis ávirkan á, at pedagogiska innihaldið í fleiri førum ikki er nøktandi.

Børn og ung við autismu hava serligan tørv, sum familjurnar í fleiri førum ikki megna at møta. Fyri at bæði børnini og familjur teirra kunnu hava eitt nøktandi lív er umráðandi, at tað almenna veitir hóskandi dagtilboð, umlætting og í ávísum førum bústað.

Tørvur er á einum nýggjum stovni, sum bæði kann rúma búplássi, umlættingarplássi og ymsum stuðulstilboðum í gerandisdegnum.

Í løtuni er bíðilisti og komandi árini fer tørvurin at vaksa, og mett er tí, at neyðugt er at taka hond um hesa avbjóðing sum skjótast.

Byggingin fevnir um sjálvan bygningin, atkomu, parkeringsøki og uttanumøki. Bygt verður í einari hædd. Samlað bruttovíddin er 948 m² og samlaða grundøkið er 7.600 m².

Sambært tíðarætlanini verður farið undir at byggja á vári 2021, og bygningurin skal vera liðugur á vetri 2022.

Bygningurin er nærri lýstur í fylgiskjali nr. 2 og nr. 3.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Bygningurin er skapaður sum ein býlingur í trimum eindum í eini heild. Høvuðsendamálið við býlinginum er at skapa eitt umhvørvi, ið hóskar til børn og ung við autismu. Býlingurin er grundaður á hugsjónina um at fevna og verja íbúgvarnar í einum virkisgrundaðum, tryggum og heimligum umhvørvi. Íblásturin er ein samanrenning millum tað siðbundna japanska húsið, við opið í miðjuni til garðar, og tær miðal eldru føroysku staðsetingarnar, eyðkendar av smáum timburhúsum.

Autisma er ein skerd menningartilgongd, sum vísur seg um trý ára aldur, men tað er ógvuliga ymiskt, hvussu fólk við autismu eru fyri. Nøkur eru so sansaviðbrekin, at tey illa tola ljós og ljóð. Onnur eru betur fyri og hava góðar møguleikar at menna seg sosialt og kropsliga við námsfrøðiligum venjingartilgongdum.

Býlingurin skal tí bæði nøkta tørvinum hjá teimum, ið eru sera illa fyri og hjá teimum, ið koma til umlætting, venjing og í frítíðarskúla. Virkniseindin er miðdepilin fyri menningartilgongdir og venjingar, og møguleiki skal vera at arbeiða við menningartilgongdum í ymiskum stigum, soleiðis at støði kann takast í hvørjum einstøkum.

Í einum størri høpi, er býlingurin eisini ein av teimum fyrstu av sínum slag. Autisma er ein lutfalsliga nýggj sjúkuavgerð og góðar umstøður til fólk við autismu eru altavgerðandi fyri teirra sálarheilsu, orkuró, miðsavnan og trivna sum heild. Flestu lond hava ikki enn bygt býlingar til fólk við autismu, tó at nakrir tílíkir bygningar eru at finna. Granskað hevur seinastu árini verið í sniðgeving til umhvørvi fyri fólk við autismu og tekur hendan ætlan støði í hesari vitan. Serliga hava sjey lyklaorð vegleitt sniðgevingargongdina:

1. Ljóð
2. Skipan av rúmi
3. Tryggleiki í rúmi
4. Greið skildran av rúmi
5. Skiftisøki

6. Sansaøki
7. Verja og tryggleiki
(ASPECCT Desing Index)

Býlingurin til børn og ung við autismu er eitt úrslit av samanrenningini millum virknistørv og tí arkitektonisku tulkingini av, hvussu virkni og heim kunnu koma saman í eina heild, har lyklaorðið er tryggleiki.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Galdandi løgtingslóg var til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum, Tórshavnar Kommunu, Landsverk, Almannaverkinum, Sosialráðgevarafelagnum, MEGD, Javna og Autismu-felagnum.

Av tí at broytingaruppskotið einans snýr seg um at hækka fíggjarligu heimildina, hevur broytingaruppskotið bara verið til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum.

Fíggjarmálaráðið hevur onga viðmerking til lógaruppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Kostnaðurin av at byggja eitt nýtt búheim og umlættingarheim er 39 mió. kr. Útreiðslurnar, ið eru hildnar áðrenn galdandi lóg var samtykt í árunum 2015-2017 var 480 tús. kr. Eftir galdandi lóg varð samtykt eru hildnar í 2018 551 tús. kr., í 2019 2.057 tús. kr. og í 2020 868 tús. kr. Eftir at broytingaruppskotið er samtykt verða útreiðslurnar í 2021 14.780 tús. kr. og í 2022 20.719 mió. kr., sí fylgiskjal 6.

Við í kostnaðarmetingini av verkætlanini er, umframt sjálvan bygningin, innbúgv og tól, uttandura spælipláss, hegn, parkeringspláss umframt allar íbindingar.

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri Tórshavnar kommunu, har bygningurin verður staðsettur.

Heimið fer at hava øktan rakstur við sær. Almannaverkið metir, at kostnaðurin av at reka tilboðini í Heiminum í Havn til børn og ung við autismu fer at kosta 15,4 mió. kr. árliga. Sundurgreinað er metti kostnaðurin av at reka seks umlættingarpláss og dagtilboð til 16 borgarar 3,85 mió. kr. árliga, og kostnaður av at reka seks bú- og viðgerðarpláss er 11,57 mió. kr. árliga. Metingin er gjørd eftir teimum fortreytum, ið verða galdandi fyri samansetta stovnin. Nakað av minking verður í verandi virksemi, og lagt er upp fyri í hesum í útrokningini. Tað er tó avmarkað, hvussu nógv minkingin verður, sambært Almannaverkinum.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið førir við sær økt virksemi fyri byggivinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið. Bygningurin verður hitaður við luft/vatn hitapumpu.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri Suðurstreymoy við tað, at staðsetingin verður á Argjum, og fer at betra um dagtilboð, umlætting og í ávísum førum bústað til børn og ung við autismu í Suðurstreymoy.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur við sær, at børn og ung við autismu fáa betri bústaðar og umlættingar umstøður enn áður. Eisini verður eitt betri skipað frítíðartilboð til børn og ung við autismu.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Ongir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið stuðlar undir ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar tann 23. august 2009.

Sambært grein 19 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini rættin hjá øllum fólkum, ið bera brek, at liva í samfelagnum á jøvnum føti við onnur og við somu valmøguleikum. Limalondini skulu viðurkenna at fólk, ið bera brek, sleppa at velja sær bústað og velja hvar og saman við hvørjum, tey vilja liva.

Sambært grein 28 í breksáttmálanum viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, hava rætt til nøktandi lívskor og tískil eisini rætt til nóg góðan bústað. Somuleiðis viðurkenna limalondini, at fólk, ið bera brek, sleppa upp í almenn bústaðartiltøk.

Lógaruppskotið er eitt stig á leiðini at liva upp til hesar viðurkendu ásetingarnar.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar marknaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp í 39 mió. kr. til at byggja eitt búheim og umlættingarheim.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Ja | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Heimildin at byggja eitt búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu fyri mesta lagi 29 mió. kr. verður broytt til 39 mió. kr.

**Til § 2**
Eingin viðmerking er til greinina.

Almannamálaráðið, 26. januar 2021

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Prosjektuppskot (upprunaligt)
Fylgiskjal 3: Umprosjekterað høvuðsprosjekt, eitt útval av tekningum
Fylgiskjal 4: Byggiskrá
Fylgiskjal 5: Tíðarætlan
Fylgiskjal 6: Útreiðslur býttar yvir ár
Fylgiskjal 7: Mettur kostnaður at reka tilboðini í Kvíggjartúni, Almannaverkið
Fylgiskjal 8: Hoyringssvar Fíggjarmálaráðið